# Jákup Augustinussen

## IN MEMORIAM

Boð av deyða merkir sváran miss og sakn hjá avvarðandi og vinum.

Í sínum virknu manndómsárum krøkti hervilig sjúka seg í Jákup Augustinussen; í aldri bert farin fýra ár um tey hálvthundrað.

Hann, sum tungur í huganum skrivar hesi orð, hevði ta gleði at starvast saman við Jákupi í út við fjórðingsøld.

Tjúgu ára gamal fekk hann læripláss í landskassans roknskaparhaldi á Føroya gjaldstovu.

Hesin dámligi ungi vágbingurin vísti seg at vera gløggur, arbeiðssamur og álítandi.

Tær stóru arbeiðsbyrðarnar - kanska serliga í 80-árunum – sum vórðu lagdar á øll (tey ungu) á Føroya gjaldstovu, vóru mangan tungar at knógva, men Jákup bar seg ongantíð undan, hóast orsøk kanska kundi verið til tess. Vælgjørt, dygdargott arbeiði frá Jákupsa hondum í meira enn ein mansaldur, hevur sett spor eftir sær.

Fyrst í 90-árunum fekk Jákup lokna hægri útbúgving í roknskapi, alt meðan hann gjørdi sítt arbeiði frá morgun til kvøld, og í 1992 gjørdist hann roknskaparstjóri í landskassans meginumsiting.

Á gjaldstovuni verður saknur og stórur missur, nú



Jákup er farin, men størstur er missurin hjá Olevinu og Rakul og Randi, tí svárt er at missa mann og pápa. Kanska er tað ein lítil uggi í sorgini, at góð minni følna ikki, og sum frá líðir, kunnu tey kveikja ljós í myrkrinum.

**Heri Mohr**

# Hugnakvøld í Porkeris skúla

TÍÐINDASKRIV

Leygarkvøldið 9. desember kl. 20 verður skipað fyri hugnakvøldi við café í Porkeris skúla.

Skráin verður fjølbroytt. Nógvur sangur við m.ø. Randi Nolsøe, Sigmund Andreassen, Óluvu Mortensen, Terja Nielsen, Anngerð Hammer, Eddi Bech, Anniku og Sigrid, Finnbjørn Nielsen og Svannu Mortensen. Eisini kemur Suðuroyarkórið at luttaka undir leiðslu av John í Skemmuni.

Lív Poulsen, ið virkar sum trúboðari í Senegal, kemur at greiða frá arbeiði sínum og at vísa myndir. Eisini verður felagssangur, upplestur og spurnarkapping.

Kvøldið verður endað við einum bíbliuorði.

Tiltakið er ókeypis og eru øll hjartaliga vælkomin.



# Havnarkórið og Suð framføra Händels Messias

**Mentanarligt samstarv gjøgnum Norðoyatunnilin: Havnarkórið og Suð framføra í felagskóri Händels Messias í Christianskirkjuni í Klaksvík og í Norðurlandahúsinum**

TÍÐINDASKRIV

At útbygda samferðalukervið, nú í seinastum við undirsjóvartunlum, skapar møguleikar til liviligari og ríkari tilveru her í okkara fjalla- og oyggjalandi er eyðsæð. Hetta merkist á øllum samfelagsøkjum, vinnu- og handilslívið fær rúmari ræsur, ítróttalívið nýggjar møguleikar, og innan annað mentanarvirksemi eitt nú í tónleikinum er veingjabreiðið víðkað til størri avbjóðingar og kravmiklari framtøk.

Framførslurnar av megnarverkinum Händels Messias næsta vikuskifti eru dømi um hetta. Havnarkórið í Tórshavn og kvinnukórið Suð í Klaksvík hava her funnið saman í fyrimyndarligum samstarvi. Áneyðir hava tí eisini verið á at víðka um í manspartinum hjá Havnarkórinum, og úrslitið er vorðið eitt so væl mannað kór, at tað kundi geva dirvi til at heita á solistar á altjóða støði uttanífrá um at verða við.

Havnarkórið fylti fjøruti fyrr í ár, og er henda framførsla sostatt ein tignarligur endi á kórsins virksemi í hesum jubileumsári.

Suð, ið merkir veingjasuð, hevur sítt støði í skúlakórarbeiði við Ósaskúlan í Klaksvík, Barnasangskúlanum hjá Jógvani við Keldu og teim gitnu 17 Sangarunum. Við Steinvør Fonn sum leiðara hevur kórið ment seg til at vera eitt av dygdarbestu kórum í landinum. Kórið hevur eyðkent seg við sínari fjølbroyttu skrá frá tí klassiska til tað nútíðarliga sum t.d. gospelsang. Við 17 satsum úr oratoriinum Messias á skránni og við Jóhannes Andreasen sum undirleikara hevði kórið væleydnaða uttanlandsferð til Skotlands seinastu páskir. Messias gjørdist soleiðis ein natúrligur bindiliður millum Suð og Havnarkórið.

Framførslurnar vera í Christianskirkjuni í Klaksvík leygardagin 9. desember kl. 17 og í Norðurlandahúsinum sunnudagin 10. desember kl. 16.



*Suð í Klaksvík*



*Havnarkórið*